FØROYA TELE

# ÁRSFRÁSØGN

# 2025

# 5 ára yvirlit – samtakið

| Mió. kr. | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Inntøkur tilsamans | 426 | 425 | 421 | 415 | 407 |
| Bruttoúrslit | 237 | 229 | 209 | 217 | 216 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) | 115 | 109 | 102 | 114 | 118 |
| Úrslit áðrenn rentur (EBIT) | 46 | 41 | 26 | 13 | 45 |
| Ársins úrslit | 38 | 33 | 20 | 14 | 41 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Støðisogn | 812 | 799 | 760 | 654 | 576 |
| Íløgur í materiella støðisogn | 76 | 101 | 181 | 177 | 70 |
| Íløgur í immateriella støðisogn | 4 | 6 | 3 | 4 | 4 |
| Ogn í umferð | 157 | 157 | 143 | 138 | 219 |
| Ogn tilsamans | 969 | 956 | 903 | 792 | 794 |
| Eginpeningur | 519 | 516 | 513 | 522 | 538 |
| **Peningastreymur** | | | | | |
| Frá rakstri | 130 | 122 | 129 | 99 | 144 |
| Frá íløgum | -80 | -106 | -183 | -182 | -73 |
| Frá fígging | -49 | 8 | 37 | -6 | -27 |
| Broyting í tøkum peningi | 1 | 23 | -17 | -89 | 44 |
| Fríur peningastreymur | 50 | 15 | -54 | -83 | 71 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| EBITDA í mun til sølu lutfall | 26,9 | 25,8 | 24,3 | 27,6 | 28,9 |
| Rakstraravkast | 10,8 | 9,6 | 6,2 | 3,1 | 11,0 |
| Ognaravkast | 4,8 | 4,3 | 2,9 | 1,6 | 5,7 |
| Gjaldførisevni | 98,2 | 118,5 | 82,5 | 112,2 | 217,8 |
| Trygdarevni | 53,6 | 53,9 | 56,8 | 66,0 | 67,8 |
| **Aðrar upplýsingar** | | | | | |
| Starvsfólk (ársverk) | 177 | 184 | 180 | 178 | 179 |
| Inntøkur fyri hvørt starvsfólk (mió. DKK) | 2,409 | 2,309 | 2,337 | 2,329 | 2,276 |
| Úrslit fyri hvørt starvsfólk (mió. DKK) | 0,217 | 0,180 | 0,112 | 0,079 | 0,226 |

Allar upphæddir eru í mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| Rakstraravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/inntøkur |
| Ognaravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/ogn tilsamans |
| Gjaldførisevni | = | (ogn í umferð x 100)/stuttfreistað skuld |
| Trygdarevni | = | (eginpeningur, íroknað minnilutaeigarar x 100)/ogn tilsamans |

# INNIHALDSYVIRLIT

Leiðslufrágreiðing 2025 .... 4
Átekning leiðslunnar .... 10
Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara .... 11
Rakstrarroknskapur .... 14
Fíggjarstøða .... 15
Peningastreymsyvirlit .... 17
Notur til ársroknskapin .... 18
Nýttur roknskaparháttur .... 24
Nevnd og stjórn .... 30

Upplýsingar um felagið
Skrásetingarnavn: P/f Telefonverkið · Skrásetingarnr.: 2697
Hjánavn: Føroya Tele · Bústaður: Klingran 3, 188 Hoyvík
Heimstaðarkommuna: 100 Tórshavn · Tel: +298 303030
Heimasíða: www.ft.fo · Teldupostur: ft@ft.fo

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING 2025

## FRÁ UMSKIPAN TIL VIRÐISSKAPAN

2025 var fyrsta heila árið undir nýggju strategiini fyri 2025–2027. Við árslok 2025 varð støðan gjørd upp, og fleiri týðandi varðar vóru náddir. Tað, sum sæst higartil, er ikki eitt stórt umbrót, men ein greið kós fyri víðari menning av fyritøkuni. Snúningsdeplarnir í strategiini eru átøk, sum skulu tryggja langtíðarframgongd og burðardyggan vøkstur við kundanum sum miðdepil og framtíðartryggjaðum undirstøðukervi.

Í fyrsta strategiárinum hava vit arbeitt eftir hesum raðfestingum á fleiri ítøkiligum økjum. Kjarnan í farnetinum varð dagførd, arbeiðið við Fipur til heimið helt fram og okkara talgildu tænastur vórðu mentar víðari. Samstundis arbeiða vit áhaldandi við innanhýsis bygnaðinum fyri at skapa optimalar karmar fyri framhaldandi menning og rakstur av samtakinum.

Føroya Tele hevur framhaldandi ábyrgd sum lyklaspælari í føroyska fjarskiftisundirstøðukervinum og í talgildu menningini av samfelagnum. Henda ábyrgd kemur til sjóndar bæði í tí dagliga arbeiðinum við at tryggja álítandi samskifti kring landið og í teimum langtíðaravgerðum, sum skulu styrkja undirstøðukervið.

Hóast kappingarviðurskiftini á marknaðinum vóru avbjóðandi, vóru fíggjarligu úrslitini góð í 2025. Umsetningurin varð 426,4 mió. kr. í mun til 424,8 mió. kr. árið fyri og hækkaði sostatt eitt vet. Rakstrarkostnaðurin var lægri enn undanfarna ár, og úrslitið áðrenn avskrivingar batnaði munandi til 114,7 mió. kr. frá 109,4 mió. kr. Avskrivingarnar vóru 68,6 mió. kr. og vóru framvegis á leið á sama støði sum árið fyri. Inntøkurnar frá kapitalpartum vóru somuleiðis hægri enn árið fyri og gjørdust 6,4 mió. kr. í mun til 5,7 mió. kr. Samlaða ársúrslitið varð tí 38,4 mió. kr., sum er 5,3 mió. kr. betri enn árið fyri.

Hóast íløgustøði á 79,8 mió. kr. framvegis er høgt, er tað tálma nakað í mun til 2024, tá ið tað var 106,1 mió. kr. Fríi pengastreymurin er sostatt eisini munandi batnaður til 49,8 mió. kr. í mun til 15,5 mió. kr. árið fyri.

Vit fara inn í 2026 við somu greiðu kós, og málið er at skapa enn meiri virði burtur úr tí, sum longu er sett í verk. Hetta skal bæði merkjast hjá kundanum og síggjast aftur í okkara avriki.

## KUNDIN ER MIÐDEPILIN

Kundin er miðdepilin í øllum, vit gera. Vit arbeiða áhaldandi við at gera tænasturnar einfaldar at brúka, álítandi í gerandisdegnum og lættar at víðarimenna, tá ið tørvurin broytist. Hetta arbeiðið fevnir bæði um privatkundar og vinnukundar.

Ein avgerandi fortreyt fyri góðum fjarskifti er tøkniliga grundarlagið undir farnetinum. Í 2025 hava vit dagført kjarnuna í farnetinum við nýggjari tøkni, sum gevur meira smidligan rakstur og hægri støðufesti. Samstundis er kjarnan hjá Føroya Tele bygd við dupultari redundans á tveimum staðsetingum í Føroyum, soleiðis at tænasturnar halda fram, eisini um einstakar eindir detta út. Hetta gevur kundum hjá Føroya Tele meira støðugt samband og betri grundarlag fyri nýggjum tænastum.

Á vinnumarknaðinum hevur samskiftisloysnin Konnekta vunnið fótafesti. Pallurin savnar telefoni, samskifti og vekslarafunktiónir í eini felags skipan og kann samantvinnast við aðrar arbeiðsskipanir hjá kundunum. Samstundis er sjálvavgreiðslupallurin Vinnurúmið víðarimentur við fleiri hentleikum, sum gera tað smidlig-

ari hjá vinnukundum at umsita tænastur sínar.

Á privatmarknaðinum arbeiða vit framhaldandi við at styrkja talgildu kundaupplivingina. Arbeitt verður við at geva kundum okkara eina felags innritan til tænastur okkara, og trúfestisskipanin Sveipa gevur kundunum fyrimunir og ágóðar á Sona-appini.

Kundakanningar vórðu gjørdar fyri bæði privat- og vinnukundar í 2025. NPS hjá privatkundum hækkaði við fimm stigum, meðan úrslitið hjá vinnukundunum helt seg á einum støðugum og høgum stigi. Í árinum varð eisini skipað fyri vinnutiltaki í Klingruni um nettrygd og talgildar avbjóðingar, umframt tveimum "Foreldur í einum talgildum heimi"-tiltøkum í Hoyvík og Klaksvík, sum fingu góða undirtøku.

Tætt samstarv við veitarar ger eisini útboðið breiðari. Føroya Tele er góðkent verkstað hjá bæði Apple og Samsung, og føroyingar hava fingið atgongd til Galaxy Store hjá Samsung. Harumframt varð farið undir samstarv við e- og ljóðbókatænastuna Mofibo, sum kundar kunnu tekna umvegis okkara talgildu pallar.

Vit arbeiða eisini fyri, at tøknin verður brúkt á ábyrgdarfullan hátt. Umvegis tænastuna Být og bøt um kunnu kundar lata brúkt tól inn til endurnýtslu, soleiðis at tey annaðhvørt verða endurnýtt, endurvunnin ella burturbeind á umhvørvisvinarligan hátt.

Við hesum menna vit framhaldandi tænastur okkara til gagns fyri bæði privatkundar og vinnulív í Føroyum og styrkja samstundis møguleikarnar at knýta fólk og fyritøkur saman við enn betri samskiftisloysnum.

## FRAMTÍÐARTRYGGJAÐ UNDIRSTØÐUKERVI

Undirstøðukervið er grundarlagið fyri allar tær tænastur, sum vit bjóða okkara kundum. Ein partur av okkara kjarnuvirksemi er at menna eitt so sterkt, skjótt og nútímans kervi sum yvirhøvur til ber og at selja nettænastur til allar fjarskiftisveitarar undir javnbjóðis treytum.

Menningin av nýggjari tøkni og eftirspurningurin frá kundum skapar nýggjan tørv á kervinum og setur krøv til umskipan. Við Fipur til heimið-verkætlanini, ið er bæði víðfevnandi og neyðug, verður undirstøðukervið skift út og lagt av nýggjum til tess at framtíðartryggja føroyska undirstøðukervið. Hetta arbeiðið er ein avgerandi liður fyri at røkka aðalmálinum, sum er at knýta føroyingar saman fyri eina betri framtíð.

Við árslok 2025 høvdu vit grivið fipurkaðlar til nærum 10.500 kundar, og ein stórur partur av hesum er eisini settur til. Arbeiðið at skifta til fipur gongur væl, og framyvir verður enn størri dentur lagdur á at flyta verandi kundar yvir í fipurnetið.

Sum liður í áhaldandi arbeiðinum við at økja um gjøgnumskygni og styrkja fríu kappingina á fjarskiftisøkinum, varð støða í 2025 tikin til at flyta sendistøðirnar á farnetinum úr tænastufelagnum P/F FT Samskifti yvir í netfelagið P/F Net, sum frammanundan er heilsøluveitari av atgongd til undirstøðukervið hjá Føroya Tele.

## SAMBAND OG SAMSTØRV ÚT Í HEIM

Føroyar eru fjarskotnar, og tí er umráðandi, at vit ikki liva avbyrgd frá umheiminum. Gott, støðugt og álítandi samband er treyt fyri, at fyritøkur og fólk kunnu avgreiða síni gerandisviðurskifti.

Í dag verður sambandið til umheimin í størsta mun tryggjað av sjókaðlunum hjá Shefa og Farice. Útbyggingar verða eisini gjørdar av veitarum av fylgisveinatænastum, sum kunnu veita altjóða sambond. Hesir møguleikar kunnu í ávísan mun nýtast til at tryggja støðugt og trygt

samband til umheimin. Roknast kann tó við, at sjókaðlar framhaldandi fara at bera høvuðspartin av samskiftinum við umheimin.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við einum møguligum triðja kaðalsambandi út í heim. Føroya Tele hevur saman við viðkomandi samstarvspørtum arbeitt við at kanna ymiskar møguligar loysnir, sum kunnu styrkja føroyska sambandið við útheimin og økja um mótstøðuførið í fjarskiftisundirstøðukervinum.

Framstig eru áhaldandi í arbeiðinum, og breið semja tykist vera um týdningin av at styrkja altjóða samband Føroya. Ein nýggjur fjarskiftiskaðal verður í hesum sambandi mettur sum ein haldgóð loysn at styrkja mótstøðuførið og tryggja støðugt samband við útheimin. Ein slík verkætlan krevur tó eitt fíggjarliga sterkt samstarv og eina greiða politiska raðfesting, og tí heldur arbeiðið fram í tøttum samráði við føroyskar myndugleikar og møguligar altjóða samstarvspartar.

Vestan fyri Hetland verður fyrireikað at knýta Shefa-2-kaðalin í Rosebank-oljuøkið. Allar neyðugar avtalur eru gjørdar, og arbeiðið er farið í gongd. Í 2026 væntast arbeiðið at verða liðugt, tá ið knýtt verður í Shefa-2-kaðalin.

## ÁBYRGD, TRYGD OG MÓTSTØÐUFØRI

Føroya Tele rekur eitt undirstøðukervi, sum hevur avgerandi týdning fyri samskiftið í føroyska samfelagnum. Trygd, veitingartrygd og mótstøðuføri eru tí ein grundleggjandi partur av rakstrinum. Tænasturnar skulu virka álítandi í gerandisdegnum, og skipanin skal eisini vera før fyri at halda fram undir truplum umstøðum.

Fleiri kritiskar skipanir vóru í 2025 staðsettar í Føroyum, og kjarnutøknin í farnetinum er bygd við dupultari redundans á tveimum staðsetingum. Hetta styrkir støðufestið í kervinum og tryggjar, at tænasturnar kunnu halda fram, eisini um einstakar eindir detta út.

Somuleiðis verður útgerð frá veitarum úr londum við øktum trygdarváða ikki nýtt í samfelagstýðandi undirstøðukervinum hjá Føroya Tele. Hetta er ein grundleggjandi fortreyt fyri at minka um trygdarváðar og tryggja betri ræði á teimum skipanum, sum kervið byggir á. Veitaravalið verður áhaldandi endurskoðað við denti á trygd og mótstøðuføri.

Samstundis varð arbeitt við at styrkja innanhýsis bygnaðin í samtakinum, og dentur varð eisini lagdur á at økja tilvitskuna um trygd og at styrkja tilbúgvingina í felagnum. Bygnaðarbroytingar og dagførdar mannagongdir skulu geva greiðari ábyrgdarbýti og sterkari grundarlag fyri avgerðum.

Umhvørvið kring nettrygd er samstundis broytt munandi í Norðurlondum, og nýggj lóggáva er undir fyrireiking í Føroyum, sum fer at leggja størri krøv til samfelagstýðandi undirstøðukervi. Føroya Tele fylgir hesi menningini neyvt og fyrireikar seg til teir nýggju karmarnar, sum væntast at koma á økinum.

## STARVSFÓLK OG MENNING

Ein fakliga sterkur, støðugur og motiveraður starvsfólkahópur er ein av teimum týdningarmestu fortreytunum fyri, at Føroya Tele kann røkka sínum strategisku málum og varðveita sína kappingarføru støðu. Føroya Tele er ein vitanartung fyritøka, og førleikarnir hjá starvsfólkunum eru tí ein av týdningarmestu kappingarfyrimunum hjá samtakinum. Tí er arbeiðið við trivnaði, førleikamenning og eini sterkari felags mentan ein natúrligur partur av bæði rakstri og strategi.

Trivnaðarkanningin í 2025 vísti framgongd bæði í trivnaði og trúfesti. Sjúkrafráveran lækkaði til 7,2 dagar, og starvsfólkaskiftið

var 12%. Samlað verður starvsfólkahópurin mettur at vera støðugur og væl fyri.

Førleikamenning hevur verið ein strategisk raðfesting innan fleiri øki, m.a. vitlíki, KT-trygd og leiðslumenning. Arbeitt verður miðvíst við at styrkja førleikagrundarlagið í felagnum, so samtakið eisini framyvir hevur teir fakligu førleikarnar, sum krevjast í einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt.

Eitt nýtt stig í hesum arbeiðinum varð tikið í 2025, og íløgan í førleikamenning verður nú máld sum lutfall av samlaðu lønarkostnaðunum fyri fyrstu ferð. Hetta er ein partur av arbeiðinum við at seta greið mál og skapa størri gjøgnumskygni um menningina av førleikunum í felagnum.

Í 2025 vóru 28% av starvsfólkunum og 29% av leiðsluni kvinnur. Samtakið arbeiðir miðvíst við at breiðka umsøkjaraskaran og tryggja skipaðar og sakligar setanartilgongdir. Málið er at røkka einum kynsbýti millum 33% og 67% í 2030.

Føroya Tele arbeiðir eisini miðvíst við at fremja javnstøðu og fjølbroytni í starvsfólkahópinum. Endamálið er at tryggja eitt fjølbroytt og fakliga sterkt arbeiðspláss, sum stuðlar undir trivnaði, samstarvi og góðum úrslitum. Arbeiðið við trivnaði, førleikamenning og fjølbroytni verður tí framhaldandi ein týdningarmikil partur av menningini av samtakinum komandi árini.

## BURÐARDYGT SAMTAK

Í heyst 2025 fór Føroya Tele undir eitt nýtt og týdningarmikið stig í arbeiðinum við burðardygd í tráð við ætlanirnar í strategiini fyri 2025–2027.

Í samstarvi við donsku ráðgevarafyritøkuna SustainX gjørdu vit eina týdningsgreining (DMA) av samtakinum. Føroya Tele er ein av fimm føroyskum fyritøkum, ið fóru undir hetta arbeiðið, sum verður gjørt í samstarvi við Vinnuhúsið gjøgnum burðardygdsnetverkið Varandi Vinna.

Saman við hesum arbeiði settu vit ein ESG-arbeiðsbólk á stovn. Hann varð fólkaður við starvsfólkum, sum longu hava royndir og vitan innan burðardygdsarbeiðið hjá Føroya Tele, umframt starvsfólkum frá arbeiðsøkjum, sum vórðu mett viðkomandi í mun til greiningararbeiðið.

Føroya Tele-samtakið ger á hvørjum ári eina sjálvstøðuga ESG-frágreiðing, Samfelagstilvit, sum verður almannakunngjørd saman við roknskapinum. Frágreiðingin liggur saman við ársroknskapinum alment tøk á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

## VÁÐASTÝRING

### ALMENNUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at føroyska búskapinum, tí størsti parturin av inntøkunum og virkisøkjunum er í Føroyum. Sveiggj í føroyska búskapinum kunnu tí ávirka samtakið. Føroya Tele skal megna at laga seg til umstøðurnar, og arbeiðir tískil støðugt við at minka um allar váðar.

### TØKNILIGUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at fjølmentari tøkni. Onkrar tøkniligar íløgur kunnu vísa seg at hava styttri livitíð ella geva minni avkast enn væntað. Hetta kann millum annað vera orsakað av skjótari tøkniligari menning, ið ger íløgur ótíðarhóskandi, ella broyttum eftirspurningi frá kundum. Framstig hava negativar avleiðingar, um Føroya Tele ikki heldur seg frammarlaga tøkniliga; serliga samanborið við tey, sum samtakið kappast beinleiðis við.

### INFRASTRUKTURVÁÐI

Føroyar liggja so fjarskotnar í mun til umheimin, at vit hava tørv á tryggum uttanlandssamskifti til evropiska meginlandið. Hetta hevur við sær, at Føroyar og vit hava ein váða í at missa uttanlandssambandið.

Føroya Tele eigur Shefa-2, sum varð tikin í nýtslu í 2008. Harumframt verður eyka kapasitetur og redundansur keyptur á Farice-kaðlinum millum Føroyar, Ísland og Skotland. Sostatt eru tvey kaðalsambond tøk, og tað minkar í ávísan mun um váðan at missa tele- og datasambandið við restina av heiminum, men støðan er ikki nøktandi. Ein nýggjur kaðal eigur at verða lagdur, so at í minsta lagi trý kaðalsambond eru út í heim.

Aðrir týðandi váðar, ið knýta seg at undirstøðukervinum, eru vaksandi hóttanin frá cyberálopum. Hesin váðin er vorðin alsamt meira sjónligur við broyttu geopolitisku støðuni. Cyberálop kunnu hava við sær álvarsligar fylgir fyri kunningar- og fjarskiftistøkninina, sum vit varða av. Ófullfíggjað ella vantandi trygdarfyriskipanir kunnu føra til brek, ið darva rakstur og tænastur.

Við serstøku ábyrgdini sum Føroya fremsti fjarskiftisveitari er tað týdningarmikið, at vit áhaldandi arbeiða við at avmarka hesar váðarnar. Hetta verður gjørt við íløgum í trygdarskipanir eins og mannagongdir verða viðlíkahildnar og dagførdar og íkomnir váðar verða skrásettir.

### GJALDSOYRAVÁÐI

Føroya Tele hevur sítt størsta virksemi í Føroyum, og meginparturin av avrokningunum eru í donskum krónum. Av øðrum gjaldoyrum fara gjaldingar fram í evrum, US dollarum og bretskum pundum. Eftir at hava mett um hesar peningaupphæddir og teir váðar, ið knýta seg at hesum, er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er avmarkaður.

### RENTUVÁÐI

Samtakið hevur skuld, og broytingar í rentustøðinum hava eina ávísa ávirkan. Eftir at hava mett um støddina av skuldini og rentuváðanum í hesum sambandi, er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at hetta ikki er ein stórur váði fyri felagið og tí eru eingi stig tikin til tess at minka um rentuváðan.

### KREDITTVÁÐI

Samtakið hevur ikki stórvegis váða av einstøkum kundum ella samhandilsfeløgum. Samtakið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum og somuleiðis við samstarvsfeløgum. Føroya Tele setur í høvuðsheitum sítt gjaldføri í SIFI-fíggjarstovnar í Føroyum og Danmark.

### UMHVØRVISÁBYRGD

Í samsvari við ársroknskaparlógina hevur Føroya Tele orðað ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa umhvørvisábyrgd. Upplýsingar um umhvørvispolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

### VITANARTILFEINGI

Føroya Tele virkar í eini hátøkniligari vinnugrein, sum krevur, at starvsfólk altíð hava dagførda vitan um tøkni og tænastur. Gjøgnum árið hevur felagið áhaldandi ment starvsfólk við venjingum og skeiðum.

Felagið ynskir eisini at draga at sær vælútbúgvin fólk við viðkomandi vitan og førleikum innan virkisøkir felagsins.

### SAMFELAGSÁBYRGD

Í samsvari við ársroknskaparlógina hevur Føroya Tele orðað ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa samfelagsábyrgd. Upplýsingar um samfelagspolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

## BÚSKAPARÁRIÐ

Árið 2025 hevur í stóran mun verið merkt av arbeiðinum at fáa meiri virði burtur úr teimum stóru íløgum, sum eru gjørdar í undirstøðukervinum seinastu árini. Fyrsta árið undir strategiini fyri 2025–2027 er farið aftur um, og virksemið hevur í størri mun verið stýrt móti lønsemi og effektivum rakstri. Samstundis er kappingin á

marknaðinum herd, og prísstøðið er undir trýsti.

Búskaparliga hevur árið verið merkt av framvegis høgum virksemi í Føroyum. Búskaparráðið metir, at føroyski búskapurin framvegis var í hákonjunkturi í 2025, hóast broytingar í útflutningsprísum togaðu vøksturin nakað niður. Arbeiðsloysið og inflatiónin vóru á lágum støði, og rentustøðið lækkaði í fleiri umførum í 2025.

### ÚRSLIT FYRI 2025

Ársúrslitið fyri 2025 gjørdist eitt avlop á 38,4 mió. kr. eftir skatt, sum er ein framgongd á 5,3 mió. kr. samanborið við 2024. Úrslitið svarar til tað, sum væntað var fyri árið.

### RAKSTUR

Nettosølan hjá samtakinum vaks úr 424,8 mió. kr. til 426,4 mió. kr., meðan rakstrarkostnaðirnir lækkaðu við 6,6 mió. kr. til 189,5 mió. kr. Av hesum vóru 122,1 mió. kr. starvsfólkakostnaðir samanborið við 119,3 mió. kr. árið fyri.

Rakstrarúrslitið, áðrenn avskrivingar, fyri 2025 gjørdist 114,7 mió. kr. samanborið við 109,4 mió. kr. árið fyri.

Avskrivingarnar vóru 68,6 mió. kr. og eru støðugar í mun til 2024, tá ið tær vóru 68,4 mió. kr.

### ÍLØGUR

Í 2025 gjørdi samtakið samanlagt íløgur fyri 76,2 mió. kr. í materiella støðisogn, umframt 4,2 mió. kr. í immateriella støðisogn. Í 2024 vóru samlaðu íløgurnar 106,5 mió. kr. Tað lægri íløgustigið endurspeglar, at denturin í 2025 í størri mun hevur verið lagdur á at fáa virði burtur úr teimum íløgum, sum longu eru gjørdar.

### FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Fíggjarstøðan javnvigaði við 968,7 mió. kr. við ársenda 2025 samanborið við 956,2 mió. kr. í 2024.

Eginpeningurin gjørdist 519,1 mió. kr. afturímóti 515,7 mió. kr. árið fyri, sum svarar til ein soliditet á umleið 54%.

Við ársenda 2025 varð støðisognin tilsamans 811,5 mió. kr. samanborið við 799,3 mió. kr. við ársenda 2024. Av samlaðu støðisognini við ársenda 2025 vóru 784,8 mió. kr. materiell støðisogn. Ogn í umferð var 157,2 mió. kr.

Skuldin hjá Føroya Tele við ársenda 2025 var samanlagt 387,1 mió. kr. samanborið við 385,0 mió. kr. við ársenda 2024. Av samlaðu skuldini vóru 227,2 mió. kr. langfreistað.

Eins og roknað varð við, varð úrslitið í 2025 betri enn í 2024.

## VINNINGSBÝTI

Nevndin mælir til, at eitt vinningsbýti á 50 mió. kr. verður útgoldið fyri fíggjarárið 2025.

## EIGARAVIÐURSKIFTI

Føroya Landstýri eigur allan partapeningin.

## ÚTLIT FYRI 2026

Føroya Tele væntar, at góða gongdin heldur fram í 2026. Kappingin verður framvegis hørð, men við stórum íløgum avgreiddum og fokus á kjarnuvirksemið, er samtakið væl fyri til framtíðarinnar avbjóðingar og møguleikar.

Við strategiini fyri 2025–2027 styrkja vit virksemið enn meira, leggja enn størri dent á lønsemi og halda fram at menna tænastur og produktir, ið tryggja, at Føroya Tele framvegis er á odda innan fjarskifti í Føroyum.

Samanumtikið væntar leiðslan, at úrslitið fyri 2026 batnar enn meira í mun til 2025, um ikki okkurt óvæntað kemur fyri.

## MERKISVERDIR TILBURÐIR EFTIR ÁRSENDA

Ongir merkisverdir tilburðir hava verið eftir ársenda í 2025.

# ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2025 fyri P/F Telefonverkið.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við galdandi føroyskar roknskaparreglur.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Vit meta, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2025 umframt av peningastreymi og úrslitinum av virksemi felagsins og hjá samtakinum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2025.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar ársaðalfundarins.

Hoyvík, hin 24. apríl 2026

## STJÓRN

Kristian Reinert Davidsen, samtaksstjóri

## NEVND

Bjarni Arnason, formaður

Finnbjørn Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Johnni M. Poulsen, næstformaður

Ólavur Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Annbritt Tummasdóttir Andersen, nevndarlimur

Janus Djurhuus, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Lena L. Mohr, nevndarlimur

# GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## TIL KAPITALEIGARARNAR Í P/F TELEFONVERKIÐ

### NIÐURSTØÐA

Vit hava grannskoðað samtaksroknskapin og ársroknskapin hjá P/F Telefonverkið fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, notum og peningastreymsuppgerð fyri bæði samtakið og felagið. Samtaksroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at samtaksroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av samtaksins og felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av samtaksins og felagsins virksemi og peningastreymi samtaksins og felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2025 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum “Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum“. Vit eru óheft av samtakinum samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar sambært hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV SAMTAKSROKNSKAPINUM OG ÁRSROKNSKAPINUM

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein samtaksroknskap og ein ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera samtaksroknskapin og ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið samtaksroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt samtakið og felagið megna at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein samtaksroknskap og ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so, at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka samtakið ella felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

### ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV GRANNSKOÐANINI AV SAMTAKSROKNSKAPINUM OG ÁRSROKNSKAPINUM

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at samtaksroknskapurin og ársroknskapurin sum heild eru uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at

hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.
- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.
- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.
- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera samtaksroknskapin og ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt samtakið og felagið megna at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at samtakið og felagið ikki eru før fyri at halda áfram við rakstrinum.
- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um samtaksroknskapurin og ársroknskapurin vísa transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.
- Leggja vit til rættis og grannskoða samtakið fyri at fáa neyðug og nøktandi grannskoðanarprógv viðvíkjandi fíggjarligu upplýsingunum hjá feløgunum ella virkiseindunum í samtakinum sum grundarlag fyri at gera eina niðurstøðu um samtaksroknskapin og ársroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og gjøgnumganga gjørda grannskoðanararbeiðið, ið skal brúkast til grannskoðanina av samtakinum. Vit hava einaábyrgd av okkara grannskoðanarniðurstøðu.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða, og samskifta um týðandi eygleiðingar, so sum møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit koma fram á í sambandi við grannskoðanina.

**UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um samtaksroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og samtaksroknskapin ella ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við samtaksroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini

Tórshavn, 24. apríl 2026

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut.revisor

# RAKSTRARROKNSKAPUR

## 1. januar til 31. desember 2025

| | | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| Nota | | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| | Nettosøla | 426.351 | 424.831 | 57.342 | 42.768 |
| 1 | **Inntøkur tilsamans** | **426.351** | **424.831** | **57.342** | **42.768** |
| | Arbeiði gjørt fyri egnu rokning og ognarført | 5.235 | 4.022 | - | - |
| | Útreiðslur til vørur og hjálpitilfar | -110.723 | -115.011 | - | - |
| | Annar rakstrarkostnaður | -79.894 | -81.004 | -19.230 | -18.874 |
| | Gjald fyri rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum | -4.152 | -4.148 | - | - |
| | **Bruttoúrslit** | **236.817** | **228.689** | **38.112** | **23.894** |
| 2 | Starvsfólkakostnaður | -122.110 | -119.272 | -35.033 | -22.206 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **114.707** | **109.417** | **3.079** | **1.688** |
| 3 | Avskrivingar av støðisogn | -68.592 | -68.428 | -7.122 | -7.898 |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **46.114** | **40.990** | **-4.043** | **-6.209** |
| 4 | Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum virkjum | - | - | 31.376 | 29.524 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í leyst atknýttum virkjum | 6.364 | 5.702 | 6.364 | 5.702 |
| 5 | Rentuinntøkur og tilíkar inntøkur | 408 | 2.784 | 11.741 | 11.360 |
| | Rentuútreiðslur og tilíkar útreiðslur | -7.263 | -9.779 | -6.853 | -7.728 |
| | **Úrslit áðrenn óvanligir postar** | **45.623** | **39.696** | **38.586** | **32.648** |
| 6 | Skattur | -7.214 | -6.629 | -176 | 419 |
| | **Ársúrslit** | **38.410** | **33.067** | **38.410** | **33.067** |
| | **Býti av ársúrsliti** | | | | |
| | Flutt frá undanfarna ári | 395.789 | 397.722 | 318.409 | 351.894 |
| | Ársúrslit | 38.410 | 33.067 | 38.410 | 33.067 |
| | **Til taks** | **434.199** | **430.789** | **356.819** | **384.961** |
| | Uppskot til vinningsbýti | 50.000 | 35.000 | 50.000 | 35.000 |
| | Uppskriving til innara virði | - | - | -27.604 | 31.551 |
| | Flutt úrslit | 384.199 | 395.789 | 334.423 | 318.410 |
| | **Býtt tilsamans** | **434.199** | **430.789** | **356.819** | **384.961** |

# FÍGGJARSTØÐA

## 31. desember 2025

| Nota | | SAMTAK 2025 | SAMTAK 2024 | MÓÐURFELAG 2025 | MÓÐURFELAG 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| | Nýtslurættindi | 11.963 | 11.972 | 466 | 1.066 |
| 8 | **Immateriell støðisogn** | **11.963** | **11.972** | **466** | **1.066** |
| | Grundøki og bygningar | 156.858 | 162.694 | 102.423 | 106.071 |
| | Undirstøðukervi | 441.215 | 469.245 | 202 | 269 |
| | Innbúgv og onnur rakstrartól | 94.978 | 55.930 | 18.187 | 18.305 |
| | Støðisogn í gerð | 91.720 | 85.709 | 275 | 250 |
| 9 | **Materiell støðisogn tilsamans** | **784.771** | **773.579** | **121.088** | **124.894** |
| 10 | Kapitalpartar í atknýttum virkjum | - | - | 285.013 | 313.637 |
| 10 | Kapitalpartar í leyst atknýttum virkjum | 14.775 | 13.755 | 14.775 | 13.755 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | - | - | 264.790 | 244.753 |
| | **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | **14.775** | **13.755** | **564.578** | **572.144** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **811.508** | **799.305** | **686.132** | **698.104** |
| | Liðugvøra og handilsvøra | 21.367 | 23.284 | - | - |
| | Undangoldið fyri vørur | 1.513 | 2.617 | - | - |
| | **Vørugoymslur tilsamans** | **22.880** | **25.900** | **-** | **-** |
| | Áogn av sølu | 35.450 | 34.910 | 26 | 88 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | - | - | 56.979 | 14.494 |
| | Partafelagsskattur | 6.131 | 3.095 | - | 121 |
| | Onnur áogn | 10.932 | 12.758 | 632 | - |
| | Tíðaravmarkingar | 12.024 | 11.679 | 1.598 | 780 |
| 11 | **Áogn tilsamans** | **64.537** | **62.443** | **59.236** | **15.484** |
| | **Tøkur peningur** | **69.776** | **68.524** | **1.242** | **846** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **157.193** | **156.867** | **60.478** | **16.540** |
| | **Ogn tilsamans** | **968.702** | **956.172** | **746.609** | **714.435** |

# FÍGGJARSTØÐA

## 31. desember 2025

| Nota | | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | **Skyldur** | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| | Partapeningur | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| | Yvirkursgrunnur | 24.869 | 24.869 | 24.869 | 24.869 |
| | Uppskriving til innara virði | - | - | 49.776 | 77.380 |
| | Fluttur vinningur | 384.199 | 395.789 | 334.423 | 318.409 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 50.000 | 35.000 | 50.000 | 35.000 |
| 12 | **Eginpeningur tilsamans** | **519.068** | **515.658** | **519.068** | **515.658** |
| 13 | Eftirløn fráfarin starvsfólk | 567 | 740 | 567 | 740 |
| 14 | Útsettur skattur | 52.172 | 44.964 | 1.997 | 2.023 |
| 15 | Aðrar avsetingar | 9.800 | 9.800 | - | - |
| | **Avsetingar tilsamans** | **62.539** | **55.504** | **2.564** | **2.763** |
| 16 | Lánistovnar | 139.875 | 154.149 | 139.875 | 154.149 |
| 17 | Tíðaravmarkingar | 87.328 | 98.355 | - | - |
| | **Langfreistað skuld tilsamans** | **227.203** | **252.504** | **139.875** | **154.149** |
| 16 | Lánistovnar stuttfreistað | 11.207 | 8.987 | 11.207 | 8.987 |
| 17 | Tíðaravmarkingar stuttfreistað | 11.588 | 13.945 | - | - |
| | Tíðaravmarkingar | 1.853 | - | - | - |
| | Peningastovnar | 60.657 | 26.416 | 60.657 | 26.416 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 26.998 | 47.224 | 2.291 | 2.163 |
| | Partafelagsskattur | 1.526 | - | 270 | - |
| | Skuld til atknýtt virki | - | - | 3.335 | - |
| | Skuld til leyst atknýtt virki | 348 | 348 | 348 | 348 |
| 18 | Onnur skuld | 45.716 | 35.585 | 6.995 | 3.951 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **159.892** | **132.506** | **85.102** | **41.866** |
| | **Skuld tilsamans** | **387.095** | **385.010** | **224.978** | **196.014** |
| | **Skyldur tilsamans** | **968.702** | **956.172** | **746.609** | **714.435** |

7 Gjald til ársaðalfundarvaldan grannskoðara
19 Nærstandandi partar
20 Veðsetingar, møguligar skyldur v.m.
21 Óvissa í sambandi við innrokning og virðisáseting
22 Eventualskyldur
23 Høvuðsvirksemi

# PENINGASTREYMSYVIRLIT

| | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|
| | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| Inntøkur tilsamans | 426.351 | 424.831 | 57.342 | 42.768 |
| Kostnaður tilsamans | -318.858 | -322.042 | -54.438 | -40.661 |
| **Peningastreymur frá inntøkum og kostnaði** | **107.493** | **102.788** | **2.903** | **2.107** |
| Broyting í vørugoymslum | 3.020 | 1.228 | - | - |
| Broyting í áogn og goldið frammanundan frá kundum | -2.095 | -25.574 | -43.752 | 19.067 |
| Broyting í vøru- og tænastuskuld, aðrari skuld og eftirl.skyldum | 21.175 | 43.173 | 40.818 | -2.805 |
| **Peningastreymur frá rakstri** | **129.592** | **121.615** | **-30** | **18.369** |
| Íløgur í immateriella støðisogn | -4.228 | -5.527 | - | -164 |
| Íløgur í materiella støðisogn, netto | -75.547 | -100.605 | -2.715 | -5.228 |
| **Peningastreymur frá íløgum** | **-79.775** | **-106.132** | **-2.715** | **-5.392** |
| **Fríur peningastreymur** | **49.817** | **15.483** | **-2.746** | **12.977** |
| Rentukostnaður, netto | -6.855 | -6.995 | 4.888 | 3.632 |
| Innanhýsis fígging | - | - | -20.038 | -31.458 |
| Lánistovnar | -12.054 | 41.057 | -12.053 | 41.057 |
| Móttikið vinningsbýti | 5.344 | 3.674 | 65.344 | 3.674 |
| Goldið vinningsbýti | -35.000 | -30.000 | -35.000 | -30.000 |
| **Peningastreymur frá fígging** | **-48.565** | **7.736** | **3.141** | **-13.094** |
| **Ársins peningastreymur frá rakstri, íløgum og fígging** | **1.252** | **23.219** | **395** | **-117** |
| Tøkur peningur 1. januar | 68.524 | 45.305 | 846 | 964 |
| **Tøkur peningur 31. desember** | **69.776** | **68.524** | **1.242** | **846** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| 1 | **INNTØKUR FYRI SAMTAKIÐ - BÝTT GEOGRAFISKT** | | | | |
| | Føroyar | 373.699 | 378.727 | - | - |
| | Útland | 52.652 | 46.104 | - | - |
| | **Inntøkur fyri samtakið tilsamans** | **426.351** | **424.831** | **-** | **-** |
| 2 | **STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR** | | | | |
| | Lønir | -102.567 | -100.739 | -29.871 | -18.907 |
| | Eftirlønargjøld | -14.230 | -13.667 | -3.635 | -2.387 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | -5.314 | -4.866 | -1.527 | -912 |
| | **Starvsfólkakostnaður tilsamans** | **-122.110** | **-119.272** | **-35.033** | **-22.206** |
| | Løn, eftirløn og samsýning til stjórar | -5.107 | -5.633 | -2.220 | -2.089 |
| | Løn og samsýning til nevndir | -1.705 | -1.672 | -1.062 | -1.062 |
| | **Løn og samsýning til stjórar og nevndir tilsamans** | **-6.812** | **-7.123** | **-3.282** | **-2.969** |
| | Fulltíðarsett størv | 177 | 184 | 45 | 28 |
| 3 | **AVSKRIVINGAR AV STØÐISOGN** | | | | |
| | Immateriell støðisogn | -4.237 | -5.826 | -600 | -1.116 |
| | Grundøki og bygningar | -6.509 | -6.225 | -3.648 | -3.648 |
| | Undirstøðukervi | -41.890 | -42.752 | -67 | -67 |
| | Innbúgv og onnur rakstrartól | -16.221 | -13.753 | -3.123 | -2.880 |
| | Vinningur við frágongd av støðisogn | 698 | 798 | 316 | - |
| | Tap við frágongd av støðisogn | -433 | -669 | - | -186 |
| | **Avskrivingar tilsamans** | **-68.592** | **-68.428** | **-7.122** | **-7.898** |
| 4 | **INNTØKUR AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM VIRKJUM** | | | | |
| | Úrslit í atknýttum virkjum | - | - | 31.376 | 29.524 |
| | **Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum virkjum** | **-** | **-** | **31.376** | **29.524** |
| 5 | **RENTUINNTØKUR OG TÍLÍKAR INNTØKUR** | | | | |
| | Renta av innistandandi og skuldarum | 21 | 2.437 | - | - |
| | Renta av áogn í atknýttum virkjum | - | - | 11.741 | 11.358 |
| | Kursvinningur | 387 | 347 | - | 2 |
| | **Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur tilsamans** | **408** | **2.784** | **11.741** | **11.360** |
| 6 | **SKATTUR** | | | | |
| | Skattur av ársins skattskyldugu inntøku | -6 | -594 | -202 | 188 |
| | Javning av útsettum skatti | -7.208 | -6.035 | 26 | 230 |
| | **Skattur tilsamans** | **-7.214** | **-6.629** | **-176** | **419** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|
| | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| **7 GJALD TIL ÁRSAÐALFUNDARVALDAN GRANNSKOÐARA** | | | | |
| Lógarkravd grannskoðan | 250 | 250 | 45 | 45 |
| Skattaráðgeving | 16 | 18 | 4 | - |
| Aðrar tænastur | 83 | 77 | 56 | 16 |
| **Samlað gjald til Spekt** | **349** | **345** | **105** | **61** |

| **8 IMMATERIELL STØÐISOGN** | Nýtsluræættindi | Tilsamans |
|---|---|---|
| **SAMTAK** | | |
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | 113.774 | 113.774 |
| Tilgongd í árinum | 4.228 | 4.228 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2025** | **118.002** | **118.002** |
| | | |
| Avskrivingar 1. januar 2025 | -101.802 | -101.802 |
| Avskrivingar í árinum | -4.237 | -4.237 |
| **Avskrivingar 31. desember 2025** | **-106.039** | **-106.039** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **11.963** | **11.963** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2024** | **11.972** | **11.972** |
| | | |
| Verður avskrivað yvir | 3-5 ár | |
| | | |
| **MÓÐURFELAG** | | |
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | 42.978 | 42.978 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2025** | **42.978** | **42.978** |
| | | |
| Avskrivingar 1. januar 2025 | -41.912 | -41.912 |
| Avskrivingar í árinum | -600 | -600 |
| **Avskrivingar 31. desember 2025** | **-42.512** | **-42.512** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **466** | **466** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2024** | **1.066** | **1.066** |
| | | |
| Verður avskrivað yvir | 3-5 ár | |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

## 9 MATERIELL STØÐISOGN

| SAMTAK | Grundøki og bygningar | Undirstøðu-kervi | Innbúgv og onnur rakstrartól | Støðisogn í gerð |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | 284.422 | 1.139.863 | 233.740 | 85.709 |
| Frágongd í árinum | - | -75.311 | -1.600 | -34.990 |
| Tilgongd í árinum | 673 | 63.892 | 52.426 | 41.001 |
| Flytingar | - | -2.489 | 2.629 | - |
| **Útveganarvirði 31. desember 2025** | **285.095** | **1.125.955** | **287.195** | **91.720** |
| Avskrivingar 1. januar 2025 | -121.728 | -670.618 | -177.809 | - |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | 28.133 | 1.589 | - |
| Avskrivingar í árinum | -6.509 | -41.890 | -16.221 | - |
| Flytingar | - | -365 | 225 | - |
| **Avskrivingar 31. desember 2025** | **-128.237** | **-684.740** | **-192.216** | **-** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **156.858** | **441.215** | **94.978** | **91.720** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2024** | **162.694** | **469.245** | **55.930** | **85.709** |
| Verður avskrivað yvir | 30-50 ár | 10-25 ár | 2-10 ár | |

Grundøki við einum samlaðum bókaðum virði upp á 16,2 mió. kr. verða ikki avskrivað.

| MÓÐURFELAG | Grundøki og bygningar | Undirstøðu-kervi | Innbúgv og onnur rakstrartól | Støðisogn í gerð |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | 183.434 | 27.922 | 64.517 | 250 |
| Frágongd í árinum | - | - | -824 | -259 |
| Tilgongd í árinum | - | - | 3.006 | 284 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2025** | **183.434** | **27.922** | **66.699** | **275** |
| Avskrivingar 1. januar 2025 | -77.362 | -27.653 | -46.213 | - |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | - | 824 | - |
| Avskrivingar í árinum | -3.648 | -67 | -3.122 | - |
| **Avskrivingar 31. desember 2025** | **-81.010** | **-27.721** | **-48.512** | **-** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **102.423** | **202** | **18.187** | **275** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2024** | **106.071** | **269** | **18.305** | **250** |
| Verður avskrivað yvir | 30-50 ár | 10-25 ár | 2-10 ár | |

Grundøki við einum samlaðum bókaðum virði upp á 13,9 mió. kr. verða ikki avskrivað.

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

## 10 FÍGGJARLIG STØÐISOGN

| SAMTAK | Kapitalpartar í atknýttum virkjum | Kapitalpartar í leyst atknýtt-um virkjum |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | - | 23.349 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2025** | **-** | **23.349** |
| | | |
| Upp- og niðurskrivingar 1. januar 2025 | - | -9.594 |
| Keyp av egnum kapitalpørtum | | 27 |
| Vinningsbýti av egnum partabrøvum | | -18 |
| Úrslit í kapitalpørtum | - | 6.355 |
| Vinningsbýti | - | -5.344 |
| **Upp- og niðurskrivingar 31. desember 2025** | **-** | **-8.574** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **-** | **14.775** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2024** | **-** | **13.755** |

| MÓÐURFELAG | | |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2025 | 226.663 | 23.349 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2025** | **226.663** | **23.349** |
| | | |
| Uppskrivingar 1. januar 2025 | 86.974 | 3.773 |
| Keyp av egnum kapitalpørtum | - | 27 |
| Vinningsbýti av egnum partabrøvum | - | -18 |
| Úrslit í kapitalpørtum | 31.376 | 6.355 |
| Vinningsbýti | -60.000 | -5.344 |
| **Uppskrivingar 31. desember 2025** | **58.351** | **4.793** |
| | | |
| Niður- og avskrivingar 1. januar 2025 | - | -13.367 |
| **Niður- og avskrivingar 31. desember 2025** | **-** | **-13.367** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **285.013** | **14.775** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2024** | **313.637** | **13.755** |

Kapitalpartarnir í atknýttum og øðrum virkjum sundurgreina seg soleiðis:

| Navn | Heimstaður | Eginogn mió. kr. | Úrslit mió. kr. | Ognarpartur |
|---|---|---|---|---|
| P/F Net | Tórshavn | 130,2 | 5,3 | 100% |
| P/F FT Samskifti | Tórshavn | 82,9 | 13,1 | 100% |
| P/F Televarpið | Tórshavn | 6,7 | 1,5 | 100% |
| P/F Shefa | Tórshavn | 66,1 | 11,5 | 100% |
| Shefa Telecom Limited | MHDC, UK | 0,0 | 0,0 | 100% |
| P/F Formula | Tórshavn | 42,5 | 19,0 | 33% |
| Sp/f Føroyska Nummar Felagið* | Tórshavn | 0,8 | 0,0 | 70% |

*Roknskapurin fyri 2025 er ikki tøkur enn, tískil eru 2024 brúkt

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

## 11 ÁOGN

Øll áogn í móðurfelagnum og samtakinum fellur til gjaldingar innan 1 ár.

## 12 EGINPENINGUR

| SAMTAK | Partapeningur | Yvir-kursgrunnur | Uppskriving til innara virði | Fluttur vinningur | Uppskot til vinningsbýti | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Saldo 1. januar 2025 | 60.000 | 24.869 | - | 395.789 | 35.000 | 515.658 |
| Útgoldið vinningsbýti | - | - | - | - | -35.000 | -35.000 |
| Flutt frá ársúrslitinum | - | - | - | -11.590 | 50.000 | 38.410 |
| **Eginpeningur 31. desember 2025** | **60.000** | **24.869** | **-** | **384.199** | **50.000** | **519.068** |

| MÓÐURFELAG | Partapeningur | Yvir-kursgrunnur | Uppskriving til innara virði | Fluttur vinningur | Uppskot til vinningsbýti | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Saldo 1. januar 2025 | 60.000 | 24.869 | 77.380 | 318.409 | 35.000 | 515.658 |
| Uppskriving í árinum | - | - | -27.604 | - | - | -27.604 |
| Útgoldið vinningsbýti | - | - | - | - | -35.000 | -35.000 |
| Flutt frá ársúrslitinum | - | - | - | 16.014 | 50.000 | 66.014 |
| **Eginpeningur 31. desember 2025** | **60.000** | **24.869** | **49.776** | **334.423** | **50.000** | **519.068** |

| | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|
| | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | t.kr. | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| **13 EFTIRLØN TIL FRÁFARIN STARVSFÓLK** | | | | |
| Avsett til eftirløn 1. januar | 740 | 702 | 740 | 702 |
| Útgoldið í eftirlønum | -302 | -357 | -302 | -357 |
| Regulering í árinum | 129 | 396 | 129 | 396 |
| **Avsett til eftirløn 31. desember** | **567** | **740** | **567** | **740** |
| **14 ÚTSETTUR SKATTUR** | | | | |
| Útsettur skattur 1. januar | 44.964 | 40.581 | 2.023 | 2.404 |
| Javning av primo | - | -1.652 | - | - |
| Javning av útsettum skatti | 7.208 | 6.035 | -26 | -381 |
| **Útsettur skattur 31. desember** | **52.172** | **44.964** | **1.997** | **2.023** |

## 15 AÐRAR AVSETINGAR

Aðrar avsetingar fevna um burturbeiningarskyldu á 9,8 mió. kr.

## 16 LÁNISTOVNAR

| | SAMTAK 2025 | SAMTAK 2024 | MÓÐURFELAG 2025 | MÓÐURFELAG 2024 |
|---|---|---|---|---|
| Fellur til gjaldingar innan 1 ár | 11.469 | 8.987 | 11.469 | 8.987 |
| Fellur til gjaldingar millum 1 og 5 ár | 50.840 | 35.948 | 50.840 | 35.948 |
| Fellur til gjaldingar eftir 5 ár | 88.773 | 118.201 | 88.773 | 118.201 |
| **Lánistovnar tilsamans** | **151.082** | **163.136** | **151.082** | **163.136** |

## 17 TÍÐARAVMARKINGAR

| | SAMTAK 2025 | SAMTAK 2024 | MÓÐURFELAG 2025 | MÓÐURFELAG 2024 |
|---|---|---|---|---|
| Fellur til gjaldingar innan 1 ár | 11.588 | 13.945 | - | - |
| Fellur til gjaldingar millum 1 og 5 ár | 37.281 | 39.547 | - | - |
| Fellur til gjaldingar eftir 5 ár | 50.046 | 58.808 | - | - |
| **Tíðaravmarkingar tilsamans** | **98.915** | **112.300** | **-** | **-** |

Tíðaravmarkingar umfata forútgjald frá kundum.

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

## 18 ONNUR SKULD

Undir onnur skuld eru 15.112 t.kr. innroknaðar í sambandi við eina ósemju við kreditor. Leiðslan hevur gjørt eina meting yvir innroknaðu upphæddina út frá søguligum prísum og áður móttiknum fakturum. Væntandi verður komið á mál við eini semju í 2026.

## 19 NÆRSTANDANDI PARTAR

Nærstandandi partar felagsins eru: Føroya Landsstýri, P/F FT Samskifti, P/F Net, P/F Shefa, P/F Televarpið, Shefa Telecom Limited, P/F Formula, P/F Formula Solutions, Sp/f Føroyska Nummar Felagið og Samtakið Klintra/Føroya Tele Í/F.

**Samhandil felagsins við nærstandandi partar**

Felagið hevur í árinum havt samhandil við dótturfeløgini. Allur handil er farin fram undir somu treytum sum allir aðrir handlar hjá felagnum.

**Avgerandi ávirkan**

Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin í felagnum

## 20 VEÐSETINGAR OG AÐRAR MØGULIGAR SKYLDUR

SAMTAK: Sum trygd fyri millumverandi við peningastovn eru tinglýst veð- og skaðaloysisbrøv uppá tilsamans 255 mió. kr. í føstum ognum, ið hava eitt bókað virði upp á 102,4 mió. kr. Veittar eru ábyrgdir umvegis peningastovn fyri tilsamans 3,2 mió. kr.

| Leigu- og langleigusáttmálar | 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| Innan 1 ár | 2.868 | 2.205 |
| Millum 1 og 5 ár | - | 140 |
| Aftaná 5 ár | - | - |
| **Tilsamans** | **2.868** | **2.345** |

Føroya Tele: Sum trygd fyri millumverandi við peningastovn eru tinglýst veð- og skaðaloysisbrøv uppá tilsamans 255 mió. kr. í føstum ognum, ið hava eitt bókað virði uppá 102,4mió. kr. Veittar eru ábyrgdir umvegis peningastovn fyri tilsamans 0,1 mió. kr. Tøkur peningur á 0,4 mió. kr. er veðsettur.

P/F Telefonverkið er samskattað við tess 100% áttu føroysku dótturfeløg og heftir solidariskt mótvegis TAKS fyri øllum samskattingarkrøvum mótvegis hesum feløgum.

SHEFA: Føroya Tele borgar fyri, at Shefa yvirheldur sínar treytir í kontrakt við viðskiftafólk í útlandinum.

## 21 ÓVISSA Í SAMBANDI VIÐ INNROKNING OG VIRÐISÁSETING

Í 2022, 2023, 2024 og 2025 hava skip verið atvold til skaðar á kaðlarnar hjá P/F Shefa, ið hava kostað tilsamans 28 mió. kr. at umvæla. Skaðavaldarnir hava fulla endurgjaldsskyldu og leiðslan metir, at útlitini eru góð fyri, at felagið megnar at innkrevja endurgjøldini. Felagið hevur fingið endurgjald fyri ein stóran part av skaðunum og við ársenda 2025 eru 8,3 mió. kr., ið felagið hevur útistandandi í hesum sambandi, førdar sum áogn á fíggjarstøðuni.

## 22 EVENTUALSKYLDUR

Samtakið hevur í sambandi við gjøld til útlendskar rættindahavarar fyri upphavsrættindi skyldu til at halda aftur og rinda royaltyskatt sambært galdandi reglum. Henda skipan hevur tó, hóast sítt víða gildisøki, bert í avmarkaðan mun verið handhevjað í praksis.

Óvissa er tí um praktisku handfaringina, herundir í hvønn mun upphæddir kunnu mótroknast ella endurvinnast mótvegis mótpørtum. Leiðslan metir, at talan í høvuðsheitum er um eina skipan svarandi til kelduskatt og sostatt ikki eina sjálvstøðuga eyka útreiðslu hjá felagnum. Viðurskiftið er tí ikki innroknað í fíggjarstøðuna, men upplýst sum ein eventualskylda.

Eventualskyldan kann ikki gerast upp álítandi við ársenda, og leiðslan metir ikki, at hon er av slíkum slag ella umfangi, at hon hevur týðandi ávirkan á fíggjarligu støðuna hjá felagnum.

## 23 HØVUÐSVIRKSEMI

Endamál felagsins er at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin fyri Føroya Tele (P/F Telefonverkið) fyri 2025 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki C stór.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

Felagið hevur gjørt frávik í mun til skemakrøvini í ÁRL bilag 2, og vísir gjaldið til Fjarskiftiseftirlitinum á linju fyri seg.

Ársfrásøgnin fyri 2025 er gjørd í donskum krónum.

### UM INNROKNAN OG VIRÐISÁSETING Í ÁRSFRÁSØGNINI

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at røkka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðis-áseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurksifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## SAMTAKSFRÁSØGN

Samtaksfrásøgnin fevnir um móðurfelagið Føroya Tele umframt atknýtt feløg, har Føroya Tele beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættinum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan.

Í sambandi við konsolideringina verða innanhýsis inntøkur og útreiðslur, innanhýsis millumverandi eins og innanhýsis vinningur og tap av transaktiónum millum tey konsolideraðu feløgini útjavnað.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða útjavnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum av nettoognum og skyldum hjá atknýttum feløgum útveganardagin.

Keypt ella nýstovnað feløg verða upptikin í samtaksfrásøgnina frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða upptikin í samtaksfrásøgnina fram til sølu/avtøku. Samanberingartølin verða ikki rættað fyri keypt, seld ella avtikin feløg.

Tá ið feløg verða keypt, verður yvirtøkuhátturin nýttur. Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirðið og dagsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum verða upptiknir sum immateriell støðisogn og avskrivaðir við eins stórum upphæddum í rakstrarroknskapinum eftir eini meting av livitíðini, tó í mesta lagi 10 ár.

## MINNILUTAPARTAEIGARAR

Í samtaksfrásøgnini verða roknskaparupphæddir hjá atknýttum feløgum upptiknar við fullari upphædd. Lutfalsligi parturin av úrslitinum og eginpeninginum hjá minnilutapartaeigarunum í atknýttum feløgum verður javnaður árliga og upptikin sum serstakur postur í rakstrinum og fíggjarstøðuni.

### UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA

Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða í fyrsta umfari umroknaðar eftir kursinum transaktiónsdagin.

Gjaldoyramunir, ið íkoma millum kursin transaktiónsdagin og kursin á gjaldsdegnum, verða tiknir við í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarligur postur.

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til kursin við roknskaparárslok. Munurin millum kursin við roknskaparárslok og dagin, tá ið áognin ella skuldin íkom, verður tikin við í rakstrinum undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### NETTOSØLA

Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um útflýggjan og váðaskifti er farið fram áðrenn roknskaparlok. Nettoinntøkan verður uppgjørd uttan mvg og onnur avgjøld og við frádrátti av øllum givnum avsláttrum.

Niðanfyri er greitt frá, hvussu tær mest týðandi inntøkukeldurnar verða tiknar við í rakstrarroknskapin:

- Inntøkur frá føstum haldum verða tiknar við í rakstrarroknskapin yvir tíðarskeiðið, sum haldið fevnir um.
- Inntøkur frá telefonitænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin samsvarandi nýtslu av tænastum.
- Inntøkur frá forútgoldnum tænastum, sum til dømis talutíð, verða tíðaravmarkaðar og tiknar við í rakstrarroknskapin samsvarandi nýtslu av tænastum.
- Inntøkur frá sølu av handilsvørum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, tá ið útflýggjan og váðaskifti er farið fram.

Vísandi til § 96, stk. 1 í ársroknskaparlógini er nettosølan av kappingarávum ikki býtt út á virkisøki. Landafrøðiligt uppbýti er tó gjørt.

### ARBEIÐI GJØRT FYRI EGNU ROKNING OG OGNARFØRT

Arbeiði gjørt fyri egnu rokning og sum er ognarført fevnir um starvsfólkakostnað og aðrar innanhýsis kostnaðir, sum eru innroknað til kostprís í ársroknskapinum undir støðisogn í gerð.

### ÚTREIÐSLUR TIL VØRUR OG HJÁLPITILFAR

Upphæddin fevnir um tilfarsnýtslu til vørusølu, keyp av fjarskiftistænastum og ráskostnaðir, nýtt til at røkka ársins nettosølu.

### ANNAR RAKSTRARKOSTNAÐUR

Rakstrarkostnaður fevnir um allan annan rakstrarkostnað.

### GJALD FYRI RAKSTUR AV FJARSKIFTISEFTIRLITINUM

Gjald fyri rakstur av fjarskiftiseftirlitinum fevnir um gjald fyri útreiðslur Fjarskiftiseftirlitsins sbrt. § 63 í fjarskiftislógini.

### STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### AV- OG NIÐURSKRIVINGAR

Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar uppá immateriella og materiella støðisogn, umframt vinning/tap við frágongd av materiellari støðisogn.

### ÚRSLIT AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM OG LEYST ATKNÝTTUM FELØGUM

Upphæddin inniheldur lutfalsliga partin av ársúrslitinum hjá atknýttum og leyst atknýttum feløgum eftir útjavnan av innanhýsis

vinningi/tapi og við frádrátti av avskriving av goodwill.

Lutfalsligi parturin av skatti í atknýttum feløgum verður tikin við í upphæddini "Skattur" í rakstrarroknskapinum.

### FÍGGJARLIGAR INNTØKUR OG ÚT-REIÐSLUR

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskapar-árinum.

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentuinntøkur og –kostnaðir.

### SKATTUR AV ÁRSÚRSLITINUM

Skattur av ársúrslitinum fevnir um partafelagsskatt og broyting í útsettum skatti. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum á eginognini, verður innroknaður beinleiðis í eginognina.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frá-vikunum, sum stava frá, at inntøkur og út-reiðslur ikki verða tiknar við í rakstrar-roknskapin og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Móðurfelagið er samskattað við P/F FT Samskifti, P/F Net, P/F Televarpið og P/F Shefa. Partafelagsskatturin verður býttur millum tey samskattaðu feløgini í mun til lutfalsligu skattskyldugu inntøkuna hjá hesum feløgum.

## FÍGGJARSTØÐAN

### IMMATERIELL STØÐISOGN

Immateriell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum av-skrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi 20 ár.

Lidnar menningarverkætlanir verða ogn-arførdar, um tær eru nágreiniliga lýstar/eyðmerktar, um felagið ætlar og er ført fyri at gagnnýta úrslitini, um kostprísurin kann gerast upp álítandi og nóg góð trygd er fyri, at inntøkur í framtíðini kunnu forrenta menningarkostnaðin umframt framleiðslusølu og umsitingarligu kostnaðirnar. Aðrir menn-ingarkostnaðir verða útreiðsluførdir í rakstrar-roknskapinum so hvørt sum kostnaðirnir verða staðfestir.

Ásettu avskrivingartíðarskeiðini eru:

| | |
|---|---|
| Goodwill | 2-10 ár |
| Nýtslurættindi | 3-5 ár |
| Ritbúnaður | 3-5 ár |
| Menningarverkætlanir | 3-5 ár |

Restvirði er 0%.

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um, um tørvur er á niðurskriving.

### MATERIELL STØÐISOGN

Materiell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum av-skrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at út-veganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Ásettu avskrivingartíðarskeiðini og rest-virðini eru:

| | Áramál | Restvirði |
|---|---|---|
| Grundøki | - | 100% |
| Bygningar | 30-50 ár | 0% |
| Undirstøðukervi | 10-25 ár | 0% |
| Innbúgv o.o. rakstrartól | 2-10 ár | 0% |

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær

verður árliga mett um, um tørvur er á niðurskriving.

Vinningur ella tap við frágongd av materiellari støðisogn verður uppgjørt sum munurin millum søluprís við frádrátti av søluútreiðslum og roknskaparliga virðið á sølutíðspunktinum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapinum undir avskrivingum.

### VIRÐISMINKING AV STØÐISOGN

Árliga verður mett um, hvørt tað eru ábendingar um, at roknskaparliga virðið á immateriellari og materiellari støðisogn er minkað meiri í virði enn tað, sum kemur til sjóndar í árligu avskrivingunum.

Eru tekin um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd fyri hvørja einstaka ogn ávikavist bólk av ognum. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

### KAPITALPARTAR Í ATKNÝTTUM OG LEYST ATKNÝTTUM FELØGUM

Kapitalpartar í atknýttum og leyst atknýttum feløgum verða tiknir við í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av innara virðinum hjá feløgunum við ískoyti av restvirðinum á møguligum goodwill.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum og leyst atknýttum feløgum verður flutt til eginpeningin í nettouppskrivingargrunn eftir innaravirðisháttinum í tann mun, roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið.

Tá ið feløg verða keypt, verður yvirtøkuhátturin nýttur. Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirðið og dagsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum verða upptiknir saman við kapitalpørtum í atknýttum og leyst atknýttum feløgum, og avskrivaðir við eins stórum upphæddum í rakstrarroknskapinum eftir eini meting av livitíðini, tó í mesta lagi 10 ár.

Atknýtt og leyst atknýtt feløg við negativum roknskaparligum innara virði verða upptikin til null, og ein møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað við lutfalsliga partinum av negativa innara virðinum hjá móðurfelagnum. Um negativa roknskaparliga innara virðið er hægri enn áognin, verður restupphæddin tikin við sum skyldur í tann mun, móðurfelagið hevur rættarliga ella veruliga skyldu til at taka á seg fíggjarligu skyldurnar hjá felagnum.

### ONNUR VIRÐISBRØV

Børsskrásett virðisbrøv, ið eru tikin við sum ogn í umferð, verða virðisásett til kursvirðið við roknskaparlok.

### VØRUGOYMSLUR

Vørugoymslur verða virðissettar til kostprís eftir FIFO-háttinum. Er nettosøluvirðið lægri enn kostprísurin, verður vørugoymslan niðurskrivað til lægra virðið.

Fyri handilsvørur umframt rávørur og hjálpitilfar svarar kostprísurin til útveganarprísin.

Fyri framleiddar liðugvørur og vørur undir framleiðslu fevnir kostprísurin um kostprísin fyri rávørur, hjálpitilfar, beinleiðis løn og óbeinleiðis framleiðslukostnaðir.

### ÁOGN

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har lagt verður upp fyri væntaðum tapum.

### TÍÐARAVMARKINGAR (ÁOGN)

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum, herundir forútgoldin leiga.

### TØKUR PENINGUR

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir.

### EGINPENINGUR OG VINNINGSBÝTI

Uppskot til vinningsbýti verður innroknað sum ein upphædd fyri seg undir eginpeninginum. Vinningsbýti verður innroknað

sum ein skylda, tá ið útlutanin er samtykt av aðalfundinum.

### AVSETINGAR

Avsetingar verða innroknaðar, tá felagið við støði í eini hending, sum er íkomin í seinasta lagi fíggjarstøðudagin, hevur eina rættarliga ella veruliga skyldu, og tað er sannlíkt, at felagið skal av við fíggjarligar ágóðar fyri at gjalda skylduna.

### PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR

Skyldugur skattur og útsettur ksattur verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt frá skattskyldugu inntøkuni fyri undanfarin ár.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðu skularháttinum av fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum, gjørd upp við støði í ætlaðu nýstluni av ognini ávikavist afturgjaldan av skylduni.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast. Í teimum førum at skattliga virðið kann gerast upp eftir ymsum skattareglum, verður útsettur skattur virðisásettur við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist gjalding av skylduni.

Broytingar í útsettum skatti, sum standast av broytingum í skattasatsi, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin. Nýtti skattasatsurin í hesum ári er 18%.

Negativur útsettur skattur (skattaáogn) verður virðissettur til tað virðið, hesin væntandi kann minka partafelagsskattin í framtíðini.

### SKULD

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís svarandi til áljóðandi virði.

Við lántøku verður lániskyldan innroknað sum móttikin upphædd við frádrátti av staðfestum transaktiónskostnaðum. Síðani verða fíggjarligar skyldur virðisásettar til amortiseraðan kostprís svarandi til kapitaliserað virði við nýtslu av tí effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttikna upphædd og áljóðandi virðið verða innroknað í rakstrar-roknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

### TÍÐARAVMARKINGAR (SKULD)

Tíðaravmarkingar, ið eru tiknar við sum skuld, fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparárum.

### AÐRAR AVSETTAR SKYLDUR

Um felagið við roknskaparlok hevur rættarliga ella veruliga skyldu, og tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, verður skyldan avsett.

### PENINGASTREYMSYVIRLIT

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar felagsins í árinum býtt á økini rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggjarvirksemi og broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening felagsins við ársbyrjan og ársenda.

### PENINGASTREYMUR FRÁ RAKSTRARVIRKSEMI

Peningastreymurin frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir, broytingar í arbeiðskapitali umframt goldnum partafelagsskatti. Arbeiðskapitalurin fevnir um ogn í umferð frádrigið stuttfreistaða skuld og tær upphæddir, sum eru partur av tøka peninginum.

### PENINGASTREYMUR FRÁ ÍLØGUVIRKSEMI

Peningastreymurin frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp ella sølu av feløgum og virksemi umframt keyp ella sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn

## PENINGASTREYMUR FRÁ FÍGGJAR-VIRKSEMI

Peningastreymurin frá fíggjarvirkseminum fevnir um broytingar í stødd ella samanseting av partapeningi felagsins og kostnaðum knýttir at hesum umframt upptøku av lánum, gjaldan av av-dráttum og útgjald av vinningsbýti til parta-eigarar.

# NEVND OG STJÓRN

## BJARNI ARNASON, FORMAÐUR

| | |
|---|---|
| Starv: | Partnari og stjóri í Sp/f NUMO |
| Bústaður: | Hoyvík |
| Útbúgving: | Cand.jur. |
| | Cand.merc.aud. |
| Nevndarlimur síðan: | 2020 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið |
| | Sp/f NUMO |

## JOHNNI M. POULSEN, NÆSTFORMAÐUR

| | |
|---|---|
| Starv: | Ráðgevi |
| Bústaður: | Miðvágur |
| Útbúgving: | MSc Economics and Business Administration |
| Nevndarlimur síðan: | 2016 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið |
| | P/F Grant |

## ANNBRITT TUMMASDÓTTIR ANDERSEN

| | |
|---|---|
| Starv: | Partnari í Momentum Consulting A/S |
| Bústaður: | Rungsted Kyst, Danmark |
| Útbúgving: | Cand.merc.fir. |
| Nevndarlimur síðan: | 2020 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið |
| | Momentum Consulting A/S |

## LENA L. MOHR

| | |
|---|---|
| Starv: | Marknaðar- og samskiftisráðgevi, IRF |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | Cand.negot. |
| Nevndarlimur síðan: | 2020 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

## ÓLAVUR SIMONSEN, STARVSFÓLKAVALDUR NEVNDARLIMUR

| | |
|---|---|
| Starv: | KT-mennari |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | MSc Software Technology, BSc Electrical Engineering |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

### FINNBJØRN SIMONSEN, STARVSFÓLKAVALDUR NEVNDARLIMUR

| | |
|---|---|
| Starv: | Dátuverndarfólk og virkisráðgevi |
| Bústaður: | Kaldbak |
| Útbúgving: | BSc in Business Administration and Information Technology |
| Nevndarlimur síðan: | 2026 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

### JANUS DJURHUUS, STARVSFÓLKAVALDUR NEVNDARLIMUR

| | |
|---|---|
| Starv: | Verkætlanarleiðari |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | Montørur |
| Nevndarlimur síðan: | 2023 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

### KRISTIAN R. DAVIDSEN, STJÓRI

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í P/F Telefonverkið |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | HD í organisatión og leiðslu, sivilverkfrøðingur |
| Nevndarsessir: | P/F FT Samskifti<br>P/F Televarpið<br>P/F Shefa<br>P/F Formula<br>Sp/f Føroyska Nummar Felagið<br>P/F Føroya Banki<br>P/F LBF<br>KT-Felagið |

FØROYA TELE

Klingran 3
FO-188 Hoyvík
Føroyar

+298 30 30 30
ft@ft.fo
www.ft.fo